# ES krevur lægri bensinprísir

Meðan prísurin á brennievni í juli var tríggjar ferðir so høgur, sum í dag, er prísfallið á bensini bert ein brotpart. Nú krevur ES lægri prísir á bensin og aðra orkukeldur, og lovar fult kappingareftirlit. Formaðurin í ES-kommisiónini, José Manuel Barroso, biður, sambært NTB, um at orkufeløgini lata oljuprísin koma brúkaranum til góðar í skap av lægri prísum á brennievni. Barroso greiddi tíðindafólkunm í Brüssel, at orkuprísirnir í ES eru hækkaðir 15 prosent seinasta árið. - Brúkarin eigur at merkja at oljuprísurin er niðurfarin. Vit fara at halda eitt vakið eyga við prísinum komandi tíðina, til tess at tryggja okkum at kappingarlógirnar verða hildnar, leggur Barroso dent á. Oljuprísurin var týsdagin 54,39 dollarar fyri tunnuna, í mun til 145,29 dollarar fyri tunnuna tann 3. juli, tá oljurprísurin var hægstur. Í sama tíðarskeiði er amerikanski dollarin vaksin frá at kosta 4,75 danskar krónur 3. juli, til at kosta 5,90 danskar krónur í dag.

*Kelda: www.offshore.no*





# Jóannes kann játta tríggjar borgarstjórar

**Fleiri fólkavald umboð kunnu eftir øllum vera í starvið hjá Tórshavnar kommunu. Um Fíggjarmálaráðið broytir eina kunngerð**

POLITIKKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í løtuni er tað ein kunngerð um samsýning, ið forðar fyri, at Tórshavnar kommuna kann løna nevndarformonnunum hægri, soleiðis at teir kunnu starvast í fullari tíð hjá kommununi. Hetta er tó eitt mál, sum Jóannes Eidesgaard fer at hyggja uppá.

Í gjár kom fram, at tað sambært kommunustýrislógini er ólógligt at hava fleiri borgarstjórar í einari kommunu í Føroyum. Heldur ikki ber til, at nevndarformenn fáa fulltíðar løn, tí sambært kunngerðini um samsýning til nevndarformenn, kunnu teir tilsamans bert vinna helvtina av tí borgarstjórin ger.

- Borgarstjórin hevur dagligu leiðsluna hjá kommununi. Sum er, kunnu samlaðu útreiðslurnar til nevndarformenn bert vera helvtin av lønini til borgarstjóran. Tí ber tað ikki til, at seta fleiri borgarstjórar, sigur Hilmar Høgenni. Hinvegin er tað soleiðis, at lønin til nevndarformenn er avgjørd í eini kunngerð, sum fíggjarmálaráðið umsitur.

### Fara at hyggja uppá tað

Fíggjarmálaráðharrin er í løtuni staddur uttanlands, og hevur ikki stórvegis viðmerkingar til málið.

- Mítt svar er her og nú, er at tað er nakaðm eg fari at seta meg inn í. Eg kundi hugsa mær at vita, hví mann skal løna fleiri fólkum í Tórshavnar kommunu júst nú. Men her og nú kann eg ikki siga nakað sum, hvat mann fer at gera. Tað er sjálvandi ein góð hugsan, at mann skal løna fólki fyri arbeiðið tey gera, men málið virkar meira komplekst. Tí fari eg at seta meg inn í málið, so fáa vit at síggja, sigur Jóannes Eidesgaard. Hann leggur afturat, at mann kundi gingið ynskinum hjá Tórshavnar kommunu á møti, og av tí talan bert er um eina kunngerð, ið skal broytast, so kann ein loysn, um neyðugt, finnast áðrenn 1. januar, tá nýggja býráðið í høvuðsstaðnum tekur við.

Jóannes Eidesgaard metir, at ein mann ikki skal skunda nakað ígjøgnum, og tískil er tað eitt mál mann skal taka upp, og ikki nakað mann skal gera óumhugsað.

*Fíggjarmálaráðharrin situr við eini møguligari loysn til fyrsta trupulleikan hjá komandi Tórshavnar býráð*

# Skeivt at skunda nakað ígjøgnum

**Annika Olsen, fyrrverandi kommunalpolitikari og innlendismálaráðharri, metir tað vera rætt at umskipa kommunulógina, soleiðis at nevndarformenn kunnu fáa meira løn. Tað skal bara ikki gerast ov brádliga**

POLITIKKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Mánadagin kom fram, at Tórshavnar kommuna ynskir at umskipa kommununa soleiðis, at kommunan fær fleiri andlit enn bert borgarstjóran. Orsøkin til hetta er millum annað, at tjóðveldi vil síggjast betri, umframt, at uppgávurnar hjá nevndarformonnunum er so mikið umfatandi í Tórshavn, at tað hevði lætt nógv um arbeiðið í kommununi, um nevndarformenninir kundu havt politiska arbeiðið eitt sindur hægri.

- Eg eri positivt innstilla fyri at broyta kommunustýrislógina soleiðis, at uppgávurnar sum nevndarformenn ikki er eitt vinstrahondsarbeiði. Hinvegin er tað óheppið at skunda eitt tílíkt mál ígjøgnum, tí tað er ikki komin fram fyrr enn nú, mitt í eini politiskari ósemju. So mann kann siga, at eg haldi, at nevndarformenninir skulu hava løn, men at hetta heldur skal vera nakað, ið er við í broytingunum í kommunala geiranum, sum eru ávegis. Hetta uppskotið skal vera klárt á Ólavsøku 2009. Tí er tað skeivt at skunda nakað ígjøgnum. Tað er heldur nakað mann skal kjakast um, og síðani gera neyðugu broytingarnar við, sigur Annika Olsen, innlendismálaráðharri. Hon leggur afturat, at hetta er nakað, ið skal broytast á ein umhugsaðan hátt, so mann ikki kemur í trupulleikar við aðrar kommunur, tá endaligu kommunalu eindirnar eru klárar.



*Annika Olsen metir ikki, at løn til nevndarformenn er nakað, ið skal skundast ígjøgnum, men hon sær positivt uppá málið*